# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Óhugnalig tøl frá løgregluni

Fríggjadagin visti Rás2 at siga frá løgregluni, at bøturnar fyri eitt nú at tosa í telefon og fyri at koyra uttan trygdarbelti eru eksploderaðar í ár. Eisini varð sagt, at í ár eru nógv klipp givin fyri, at fólk ikki hava børnin íbundin í bilinum.

Tað má vera vorðið sum gáloysni, at foreldur og fólk fáa seg til at fara avstað við bili uttan at tryggja sær, at børnini eru trygt íbundin. Skipanin hevur nú verið galdandi í fleiri ár, at øll í bilinum skulu nýta trygdarseðlan. Tað var longu í 1986, at lóg kom í gildi, at trygdarseðlar skulu vera bæði aftan og framman í bili – og nakað seinni kom lógin í gildi sum segði, at trygdarseðlar, sum eru tøkir í bilinum, skulu brúkast.

Tað gekk ein tíð, har fólk kjakaðust um, hvørt trygdarseðlar nú eru so tryggir, sum man vil vera við. Men tann mytan, at fólk verða bjargað, tí tey ikki sita í trygdarseðlunum, er langt síðani manað í jørðina. Tvørturímóti, so hevur landslæknin fleiri ferðir víst á, at um fólk høvdu nýtt trygdarseðlar, so vórðu hundraðtals mannalív bjargað.

Fyrsta ferðsluvanlukkan í Føroyum, sum kravdi mannalív, hendi á Varmakeldueiði í Eysturoy 2. september í 1928. Síðani tá eru umleið 270 fólk deyð í ferðsluni í Føroyum. Tað skerst ikki burtur, at ferðslutrygdarmenningin seinnu árini heilt víst hevur bjargað nógvum mannalívum.

Her í Miðlahúsinum í Vágsbotni kunnu vit fylgja við, hvussu Ferðslutrygd hvønn fríggjadag eggjar ungum til at hava fyrilit fyri ferðslutrygdini. Tí í grannahúsinum, Peruni, bjóðar Ferðslutrygd framhaldsskúlanæmingum á skeið, har tey fáa eina gjølla frágreiðing um Ferðslutrygd, har ferðsluoffur greiða frá, hvussu teirra lív er broytt av syndarligum ferðsluvanlukkum, og har tey ungu sleppa at royna trygdarseðlan í Hvølvusi-bilinum hjá Ferðslutrygd, sum melur runt, so fólk kunnu royna at sita í einum rullandi bili.

Jú, nógv góð framstig eru í ferðslutrygdartilvitanini hjá fólki. Men tá fólk í hópatali verða tikin, tí tey ikki hava tryggjað sær at børnini eru íbundin, tá er kortini okkurt, sum ikki ruggar rætt. Hesi fólk eiga at skamma seg, tí eingin hevur rætt at seta barnsins lív í váða í berum gásloysni.

**Sosialurin**

## Skráin hjá Vinnumálaráðnum



**JOHAN DAHL**

Við tí breidd, sum Vinnumálaráðið hevur, er skráin hjá ráðnum tilsvarandi breið. Hinvegin er umráðandi at prioritera og ikki at arbeiða við ov nógvum uppgávum í senn. Eg havi sum landsstýrismaður serliga lagt meg eftir støðugt at halda viðlíka og betra um karmarnar hjá vinnuni umframt at leggja meg eftir inntøkuskapan.

Fyri at at samfelag okkara skal vera attraktivt hjá okkara ungu at virka í, er ein av fortreytunum, at møguleikarnir at byrja egnu fyritøku ella at fáa boðið áhugaverd og spennandi størv er tilstaðar. Og við tí støðu, sum landskassin er í, er tað umráðandi at økja um aktivitetin í samfelagnum Tað kann verða gjørt bæði við tiltøkum, sum virka upp á stutt sikt og sum nýggjur varandi vinnuligur aktivitetur.

Vit hava fleiri dømir um, hvussu týdningarmikið tað er at veita vinnu tryggar og góðar karmar at virka undir, so sum alivinnan og nú FAS og vónandi harav avleitt virksemi. Hetta arbeiði verður sum sagt at halda fram, og ætlanin er at taka vinnugrein fyri og aðra eftir fyri at meta um karmarnar og gera uppskot til neyðugar ábøtur.

Hin parturin av okkara høgt prioriteraða arbeiði er sum sagt inntøkuskapan. Eg havi lagt fyri Løgtingið eina frágreiðing ”Vøkstur og Virksemi”, sum lýsir 23 átøk innan 18 ymisk øki, sum ætlanin er at seta í verk fyri at bøta um støðuna hjá verandi og nýggjum vinnum, og harvið skapa vøkstur og tryggja arbeiðspláss, bæði uppá stutt og longri sikt. Hesi 23 átøk eru grundað á eitt tætt samskifti við ráð, felagsskapir, virki og fólk úr vinnuni, sum eru biðin um at leggja fram síni uppskot og eisini at ummæla lidnu ætlanina, umframt at orðaskifti hevur verið um ætlanina umvegis heimasíðu Vinnumálaráðsins.

Tey 23 átøkini eru bólkað í fýra sløg av átøkum. Hesi eru:

- Átøk at betra um vinnuligu karmarnar
- Átøk at menna nýggjar vinnur
- Førleikamenning og útbúgving
- Marknaðarføring av Føroyum

Tey ymsu átøkini eru størri ella minni í vavi og virka á ymsum økjum, men kunnu summi av teimum – fara tey at eydnast – fáa heilt stóra ávirkan á inntøkuskapanina og harav fylgjandi tal av arbeiðsplássum, um tað t.d. eydnast at fara út á hav at ala ella at virka stóran part av pelagiska tilfeinginum í Føroyum.

Eydnast at fáa gongd á og meira vinnugransking ella at fáa útlendskar íleggjarar at gera íløgur í føroyska hátøkniliga framleiðslu, fer tað eisini at medvirka til at gera tað áhugavert hjá føroyingum at koma heimaftur eftir lesna uttanlands og veita sítt íkast til neyðugu virðisøkingina.

Eg haldi, at virksemisskapan skal standa fremst á breddanum, nú ið farið verður undir gerð av fíggjarlógini fyri 2011.

## Afturhaldið vísir sítt ljóta andlit í Løgtinginum



**EDMUND JOENSEN**
løgtings- og fólkatingsmaður

Konservativar kreftir í Løgtinginum vilja draga Føroyar aftur í tíðina til eina valskipan, ið mest av øllum tænir áhugamálunum hjá teimum sjálvum.

Fá munnu hava forstáilsi fyri tí, sum fyrifirst í Løgtinginum í hesum døgum.

Fortelur tú útlendskum starvsfeløgum ella vinfólkum, at Løgtingið í dag viðger ikki færri enn trý ymisk uppskot um valskipaninina, nú tvey ár eftir, at valskipanin seinast varð broytt, rysta tey við høvdinum.

Tað sama gera skilafólk her í landinum.

Kortini er veruleikin, at fólkavald sita og diskutera, hvussu tey skulu pilka við eina valskipan, so hon kann avskeplast og gerast ótíðarhóskandi og órættvís. Hetta er væl at merkja samstundis, sum landið er um at fara av knóranum, tí hallið veksur upp um oyruni á okkum.

Er hetta rímiligt? Svarið kenna øll.

Fjórða uppskotið í samband við valskipanina eigur undirritaði. Hví? Jú, tí eg haldi, at vit, sum sita í Løgtinginum, eiga at lata skipanina við einum valdømi fáa frið.

Mítt uppskot snýr seg um at senda spurningin um valdømi út til fólkaatkvøðu. So kunnu fólk sjálvi gera av, um farast skal frá tí eina valdøminum ella ikki. Tað er hitt mest demokratiska at gera, nú Løgtingið ikki kann semjast við seg sjálvt um at lata skipanina við einum valdømi sleppa at royna seg.

Hini trý uppskotini benda øll meira og minni á tann bógvin, at tey vilja draga Føroyar aftur í gomlu støðuna, ið hoyrir einari farnari tíð til. Hetta var ein tíð tá Føroyar vóru eitt avbyrgt oyggjasamfelag, har fólkatal, búseting og liviumstøður vóru heilt øðrvísi enn í dag.

Tá høvdu lokalir kongar og barónar eina valskipan, sum mest av øllum tænti teirra egnu áhugamálunum. Hesir eiga ikki at fáa loyvi at draga okkum aftur í gomlsu støðuna, ið var ein orsøk til støðugt meira klandur og stríð enn neyðugt millum útjaðaran og miðdepilin í Føroyum.

Tað er gleðiligt at støðugt fleiri hava gjørt alment vart við seg seinastu dagarnar. Eg hevði tó ynskt, at fleiri søgdu hart og týðiliga, at tey ikki bert vilja varðveita skipanina við einum valdømi. Eri bangin fyri, at her skal meira til, um fólkavald skulu fáast at lurta. Her má koma eitt krav um at fáa málið til fólkaatkvøðu.

Vit, sum vilja lata fornuftina ráða, mugu eina ferð fyri allar greiða Løgtinginum frá, at Tingið skal lata veljaran taka avgerðina um, hvørt farast skal frá tí eina valdøminum ella ikki.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.